# Gott í teg, Jóannes

HØGNI HOYDAL



Jóannes Eidesgaard, løgmaður, ber nú alment fram, at Føroyar eiga at vera leysar av donskum pengum í 2015.

Vit fegnast í Tjóðveldisflokkinum.

Av fleiri orsøkum.

Í fyrsta lagi tí, at endiliga kemur eitt politisk mál, sum vit kunnu halda fast um – heldur enn at embætisfólk fáa ábyrgdina av at seta mál, ið politikarar ikki verða bundnir av.

Í øðrum lagi, tí at hendan útsøgn løgmans kann bróta politisku stillstøðuna í føroyskum politikki og birta upp undir veruliga atgerð og heilt nýggjar samstarvsmøguleikar.

Í triðja lagi, tí at alneyðugt er at leggja á annan bógv í búskapar- og fíggjarpolitikki landsins, áðrenn vit skumpa okkum sjálvi heilt aftur í 80'ini. Við at gera okkum leys av donsku pengunum, seta vit okkum sjálvum krøv um ábyrgd, stabilitet og nærlagni, og fáa sett kikaran á framtøk til tess at økja um framleiðslu, útflutning, kapping og samstarv í altjóða samfelagnum.

Í fjórða lagi, tí at málið hjá Jóannesi ikki liggur langt frá tí, ið Tjóðveldisflokkurin hevur sett um at taka fullveldi í næsta valskeiði: Tað valskeiðið endar í 2012, og við 4 ára skiftistíð frá fullveldistøku er ikki fíggjarliga langt ímillum okkum.

Vit hava eisini heft okkum við, at løgmaður í seinastuni fleiri ferðir alment hevur borið fram, at vit ikki fáa gjørt tað, ið vit veruliga ynskja – bæði her heima og úti í heimi – tí at vit ikki eru ein sjálvstøðug tjóð.

Jú, sanniliga kann tað, sum skilti okkum í gjár, savna okkum í morgin.

Nú ræður bert um at seta gerð aftan fyri orðini. Tí her skal byrjast beinanveg, og nógvar broytingar krevjast til tess at náa málinum.

At strika skattalættan fyri næsta ár og at stovna Búskapargrunn Føroya, kundu verið tey bæði fyrstu ítøkiligu stigini í hesum sambandi – og bæði hesi uppskot eru fyri á tingi í komandi viku.

So gott í teg, Jóannes. Lat okkum finna semju um bæði málið og neyðugu uppskotini at fremja tað í verki.

# Løgin ferðslutrygd

EDVARD JOENSEN



Tað er undrunarvert, at Ráðið fyri Ferðslutrygd skal hava skrúvað høvdið av og lagt alt vit og skil í ruskspannina, tá hasar útvarpslýsingarnar, sum nú eru at hoyra, vórðu gjørdar.

At hugsa sær, at Ráðið fyri Ferðslutrygd ger útvarpslýsingar, har ein genta, mamma ella kona ringir til ein, sum koyrir bil.

Tað er jú bannað at tosa í telefon, meðan tú koyrir bil.

# Ein vælsignaður lætti –

POUL MICHELSEN
løgtingsmaður



At avvikla blokkin er størsti og mest týðandi boðskapur, Jóannes Eidesgaard, løgmaður hevur sent føroya fólki í hesum valskeiðnum.

Kann búskaparliga álitið um visjón 2015 enda við hesum setningi, er ein spennandi og mennandi politisk tíð í væntu.

Ein glotti í evsta tíma, sum vónandi kann leggja lunnar undir eina nýggja búskaparmenning.

Á aðalfundi í Havnar Frambursfelag seinasta mánadag var júst hetta málið uppi og vendi, og við nøkulunda sama setningi. Undirtøka var fyri at avvikla blokkin bæði millum politikararnar og fundarfólkið.

Tað er langt síðan, at eg varð so fegin um ein politiskan boðskap frá nøkrum politikkara, sum tá eg læs viðtaluna, sum Sveinur Tróndarsson, blaðmaður á Dimmu hevði við løgmann, har hesin í greiðum orðum boðaði frá, at danski blokkurin eigur at avviklast næstu komandi árini.

Greinin sannførdi meg um, at boðskapur løgmanns er greiður yvir, at føroyski búskapurin ikki gerst sjálvberandi so leingi óproduktivi danski blokkurin spillur fíggjarrenslið.

Studningsbúskapur er ongastaðni loysnin. Hann fremur onki uttan máttloysi, líkasælu og skeivar búskaparliga avgerðir. Tí er hetta ein góður og mennandi boðskapur at senda almennum og privatum virksemi bæði heima á klettunum og uttanlands.

Ein boðskapur við stórum signalvirði.

Gaman í, løgmaður leggur aftrat, at avviklingurin av blokkinum skal fremjast í mun til búskaparvøksturin. Hesum eri eg tó ikki samdur í - tí nær er búskapurin í slíkum vøkstri, at viljin er til at avvikla? Fyri mær er tað púra greitt. Ein avviklingur av blokkinum má fara fram eftir einum føstum og greiðum. Sitandi samgonga átti at havt skorið blokkin við 50 mill í ár og 50 mill næsta ár. Hetta heðvi minkað um trýstið á ov heitan búskap. Men hetta verður ikki gjørt, tí ov nógvir politikarar halda heilt einfalt, at blokkurin er bjarganin og hevur positivt árin á búskapin. - Tað hevur hann ikki! - Hvørki í upp - ella niðurgangstíðum.

Á fundi í Havnar Framburðsfelag í seinastu viku tók eg blokkstuðulin upp og skeyt upp, at vit avvikla blokkin við minst 50 mill um árið tey komandi árini til hann er burtur. Undirtøka var fyri at skerja blokkin, og ivist eg onga løtu í, at løgmaður kann rokna við fullum stuðli frá Fólkaflokkinum í at serkja blokkin burtur í næstum.

Um blokkurin verður skorin við at yvirtaka málsøkið ella við avtalaðum niðurskurðum av sjálvum blokkinum, er fyri mær ein og sama sak.

Visjón 2015 fær við boðskapi løgmans heilt nýtt og veruligt innihald. Visjónin hevur heilt einfalt mangla sjálvræði og ábyrgd av hesum landi. Við fráboðan løgmanns er nógv av hesum komið upp á rætt. Ein vælsignaður lætti.

# Heimsins vánaligasta umbering

KAJ LEO JOHANNESEN
Sambandsflokkurin



So havi eg upplivað tað við, innan vinnulívið í Føroyum. Trúði ikki mínum egnu oyrum, tá eg tendraði útvarpslurtið í morgun, har boðað varð frá, at stóra verkætlanin hjá JFK fer fyri bakka. Ein av teim tungu grundgevingum ella umberingunum var, at útmeldingarnar frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum høvdu verið ógreiðar í seinastuni. Hetta varð sagt, sjálvt um eingin lóg er broytt yvirhøvur og eingin lóg kemur at broyta tær treytir sum reiðaríið hjá Nærabergi longu hevur fingið frá Fiskimálaráðnum.

Tá eg so hoyrdi víðari, at trolarin skuldi umbyggast fyri 100 tals mill krónir fyri at fiska kryll í Íshavinum, og alt hetta er grundað á nakrar ógreiðar útmeldingar frá Landstýrismanninum í fiskivinnumálum, so visti eg ikki um eg skuldi gráta ella flenna. Tá vit tosað um verðandi lóg um vinnuligan fiskiskap, so er skipanin tann, at hon er rullandi í 10 ár í senn t.v.s at hvørt ár verða loyvini endurnýggja, eingin broyting yvirhøvur.

Tað sum ein breiður meiriluti á tingi ynskir, er at fáa staðfest í lógini um vinnuligan fiskiskap, at eingin føroyingur skal kunna eiga havsins ríkidømi runt Føroyar í allar ævir. Tí hevur tosað verði um at seta ein dato fram til 2018 og síðani eventuelt endurnýggja í fimm ár framyvir, tað vil siga at karmar verða fastlagdir fram til 2023, so verandi aktørar hava tryggar karmar at virka undir.

Til Hanus Hansen vil eg siga, at tað hevði verið uppá sítt pláss at komi við eini rætting sum segði, at grundin til at skipið leitar aðrar vegir, er, at hendan verkætlanin hongur ikki saman, sjálvt um treytirnar frá tí almenn hava verði munandi betri enn aðrastaðni, og tí roynir man ein nýggja verkætlan.

Síðani tekur fyrrverðandi landstýrismaður í fiskivinnumálum bóltin upp og brúkar lagnuna hjá 200 menniskjum umborð á Nærabergi til at vinna sær politiskar fyrimunir. Tað er langt úti og vónandi kunnu fólk sjálvi gjøgnumskoða, hvat hetta er fyri eitt spæl, sum hevur til endamáls at tekkjast nøkrum fáum.

Spurningurin til Fólkaflokkin er sera einkul: Heldur Jørgen Niclassen og Fólkaflokkurin, at tey loyvi sum eru givin, eru ogn hjá nøkrum fáum í allar ævir, ella heldur flokkurin ikki at tað er rímilgt at staðfesta ognarrættin yvir okkara sokallaða ríkidømi, soleiðis at vit ikki innan stutta tíð hava spælt okkum av við hesi rættindi fyri altíð? Hvat høvdu føroyingar sagt um eventuelt oljuríkidømi hevði verði givið nøkrum fáum fyri allar ævir?

## Tíðaravmarkað LÆRARASTØRV í skúlanum á Ziskatrøð

**Søkt verður eftir 2 lærarum í parttíðarstørv í tíðarskeiðnum 11. apríl - 28. juni 2007**

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum

Annað starvið fevnir um støddfrøði í 9. fl, alisfrøði í 9. fl., teldulæru í 10. fl., støddfrøði í 8. fl. og náttúra/tøkni í 5. fl. Tilsamans 22 tímar.

Hitt starvið fevnir um lærugreinirnar enskt, týskt, danskt og føroyskt í framhaldsdeildini og serundirvísing. Tilsamans 17 tímar.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava læraraútbúgving. Best er, at umsøkjarar hava starvsroyndir, men øll eru vælkomin at søkja. Um eingin fólkaskúlalærari søkir, verða fólk, ið hava aðra útbúgving sett, í starvið.

**Lønar- og setanartreytir**
Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

**At senda umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og próvavritum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi mikudagin 4. apríl.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Skúlan á Ziskatrøð telf. 455025

**Skúlin á Ziskatrøð**
Skúlavegur
700 Klaksvík